So fekk Christian Høgni fyrsta málið

Í løtuni tykist sum um, at føroyingurin er fyrsta valið í Vejle-álopinum

1.DEILD DANMARK
Páll Holm Johannesen

Vejle var um vikuskiftið á vitjan hjá B93, og við einum 2-0 sigri, hevur liðið hjá Christiani Høgna fult stigartal eftir tríggjar dystir. Rúnavíkingurin fekk sítt fyrsta landskappingarmál í Vejle troyggjuni um vikuskiftið, og tað má avgjørt styrkja um hansara støðu í Vejle-álopinum.

Hetta vikuskiftið hevði Vejle-venjarin, Frank Petersen, valt føroyingin og Michael Blom sum fremstu menn. Hetta má kennast sum ein dygg álítisváttan hjá Christiani Høgna, tí í løtuni tykist sum um, at føroyingurin er fyrsta val í Vejle-álopinum, meðan Jerry Brown og Michael Blom skiftast um hin álopssessin.

Um vikuskiftið fekk so Christian Høgni Jacobsen sítt fyrsta landskappingarmál í Vejle-troyggjuni, tá Vejle á útivølli vann 2-0 á B93.
Mynd: Savnsmynd

Uppiborin sigur

Á heimasíðuni hjá Vejle, verður sagt at sigurin hjá Vejle var uppiborin. B93 royndi at trýsta Vejle, men teir komu aldrin til teir heilt stóru málmøguleikarnar.

Christian Høgni hevði eina royndi í fyrra hálvleiki, men hon varð bjargað á strikuni. Tá góður tími var farin av dystinum kom fyrsta málið. Eftir hornaspark, er Christian Høgni fyrstur á bóltinum, og so var fyrsta málið hjá føroyinginum í Vejle veruleiki.

Hann varð løtu seinni útskiftur við Jerry Brown.

10 minuttir fyri leiklok fekk Vejle aftur mál. Kern Lyhne kundi við sínum triðja máli í ár leggja gestirnar frammum 2-0, og tað gjørdist eisini endaliga støðan.

Vejle hevur framvegis fult stigartal, og liggur á odda í 1.deild saman við Ølstykke, sum eisini hevur fult stigartal.

Næsti dystur hjá Christiani Høgna verður á Tórsvølli ímóti Liktinstein, og vónandi klárar runavíkingur at halda góða formin, sum hevur tryggjað honum fast plass á Vejle-liðnum.

FCK aftur mál í seinastu minuttunum

Todi byrjaði, men var ikki serliga eyðsýndur, og varð eisini í seinna hálvleiki útskiftur

SUPERLIGA
Páll Holm Johannesen

Tað er við at gerast gerandiskostur hjá FCK at skjóta mál í seinastu minuttunum. Seinastu vikurnar hevur høvuðstaðarliðið í nærum hvørjum dysti fingið mál beint fyri leiklok, og soleiðis varð eisini hetta vikuskiftið.

Innskifti Morten Bisgaard vann FCK annað stigið, tá hann í 90.minutti, við eini perlu av einum málið, javnaði til 2-2 ímóti FC Midtjylland.

Todi byrjaði inni

Hans Backe hevði valt at nýta sama álopsparið frá UEFA Cup-dystinum ímóti Lokomotiv Tbilsi hóskvøldið, og hetti merkti, at Todi Jónsson og Jørgen Pettersson báðir vóru við frá byrjan í FCK-álopinum.

Sibusisu Zuma er framvegis skaddur, og hóast frágera flotta málið seinasta vikuskiftið ímóti Farum, so var Peter Møller aftur á beinkinum ímóti FC Midtjyllandi.

Í fyrra hálvleiki leikað javnt, har bæði FC Midtjylland og FCK skiftust um at trýsta. Tað kom bert eittans mál í fyrra hálvleiki, og tað fekk heimaliðið. Søren Skriver var maðurin, sum hevði seinasta fót á.

Ikki vóru nógvir minuttir farnir av seinna hálvleiki, so svaraði FCK aftur. Liðskiparin, Christian Lønstrup, skeyt útifrá og umvegis ein FC Midtjyllandleikara streyk bólturin framvið nýggja eykamálmanninum á landsliðnum, Peter Skov Jensen, og so var 1-1.

Jens Jessen legði miðskeiðis í seinna hálvleiki heimaliðið frammum aftur, eftir góða sending frá Pimpong, sum umframt at leggja upp til seinna málið, eisini var besti maðurin á vøllinum sunnudagin.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki kom Peter Møller inn fyri Toda, sum avgjørt ikki hevði ein av sínum bestu dystum sunnudagin. FCK royndi at trýsta eftir útjavnadi málinum- og tað kom eisini. Í 90. minutti endar bólturin hjá innskifta Morten Bisgaard, sum umvegis tvørstongini setti bóltin í netið til endaliga úrslitið 2-2. Langt í eykatíðini kundi Peter Møller enn einaferð vunnið dystin fyri høvuðstaðarliðið, men skotið brast í stongina, og út aftur í spæl.

Komandi vikuskiftið verður stórdystur í Parkini tá arvafiggindarnir FCK og Brøndby bresta saman. Væntandi verður Sibusisu Zuma klárur til dystin, og spennandi verður, um hvør má víkja fyri suðurafrikanska framherjanum í FCK-álopinum. Todi hevur higartil skotið trý mál, meðan svein Jørgen Pettersson enn hevur sítt fyrsta mál til góðar í FCK-troyggjuni, so spennandi verður um tað verður føroyingurin ella sviin, sum vera undir liðini á Zuma í FCK-álopinum ímóti Brøndby.

So bragdaði hjá Brøndby

Eftir slaka byrjan á heimligu kappingina, bragdaði um vikuskiftið hjá meistaraliðnum Brøndby. Við sannførandi 4-0 sigri á Viborg, liggur liðið hjá Michael Laudrup nú í miðjuni í Superliguni.

Tað er kreppa í Viborg, og fleiri spælarar vísa alment sína ónøgd við venjaran. Hvussu er og ikki, so liggur Viborg, eftir ósigurin um vikuskiftið, niðast í bestu dansku fótbóltsdeildini.

Brøndby hevur tveir sera týdningarmiklar dystir í næstum. Fyrst skulu teir royna at endurtaka sigurin í Parkini fyrr í ár, og síðani kemur norska meistaraliðið Rosenborg á vitjan.

Tað gongur væl hjá nýggja venjaranum í AGF, Poul Hansen. Um vikuskiftið fekk AGF vitjan av oddaliðnum OB, og heimaliðið vann 3-2. Seinasta málið í dystinum kom stutt fyri leiklok, og var tað Morten Poulsen, sum skeyt tað. Við sigrinum er AGF nú ímillum oddaliðini í Superliguni, og tað má kennast væl, tí seinastu árini hevur felagið bart undir niðurflyting.

Uppflytarnir úr Køge høvdu sunnudagin vitjan av Silkeborg, og mátti heimaliðið leggja rygg til eitt 4-0 tap. Silkeborg var nógv betra liðið, og Køge-spælararnir høvdu torført við at fóta sær í høgu leikferðini.

AAB er nýtt oddalið í Superliguni, eftir at teir vunnu 1-0 á heimavølli á AB. Nýfloygdi landsliðsleikarin hjá AAB, Michael Silberbauer, var sera eyðsýndur, og var við í tí mesta hjá heimaliðnum. Kortini var tað ikki Michael Silberbauer, ið skeyt málið hjá AAB, men bert 19 ára gamli Jakob Sørensen.

Christian Andersen og hansara menn í Farum fingu vitjan av Esbjerg leygardagin, og hóast heimaliðið var eina løtu frammanfyri 3-1 eina løtu, so vóru tað gestirnir úr Esbjerg sum vunnu 4-3. Hetta var fyrsti sigurin í hesum kappingarárinum hjá Esbjerg. Við ósigrinum eru uppflytarnir úr Farum næstniðastir í Superliguni.

Danska superligan

		d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1	AaB	4	3 - 0 - 1	6	4	2	9
2	FCK	4	2 - 2 - 0	9	6	3	8
3	OB (S)	4	2 - 1 - 1	10	5	5	7
4	AGF	4	2 - 1 - 1	7	5	2	7
5	Silkeborg	4	2 - 1 - 1	7	5	2	7
6	Brøndby (M)	4	2 - 0 - 2	9	6	3	6
7	FCM	4	1 - 2 - 1	5	5	0	5
8	Esbjerg	4	1 - 1 - 2	10	11	-1	4
9	AB	4	1 - 1 - 2	5	8	-3	4
10	Køge	4	1 - 1 - 2	7	12	-5	4
11	Farum	7	1 - 0 - 6	7	10	-3	3
12	Viborg	4	0 - 2 - 2	5	10	-5	2

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

Danska 1. deild

		d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Vejle	3	3 - 0 - 0	7	1	6	9
2	Ølstykke	3	3 - 0 - 0	9	5	4	9
3	Brønshøj	3	2 - 0 - 1	7	3	4	6
4	Frem	2	2 - 0 - 0	6	2	4	6
5	Herfølge	3	2 - 0 - 1	7	5	2	6
6	HFK Sønderj.	3	1 - 1 - 1	8	7	1	4
7	B 1913	3	1 - 1 - 1	5	5	0	4
8	Fredericia	3	1 - 1 - 1	4	6	-2	4
9	FC Aarhus	3	1 - 0 - 2	8	8	0	3
10	B93	2	1 - 0 - 1	3	3	0	3
11	Hvidovre	2	1 - 0 - 1	3	5	-2	3
12	Randers F.	3	1 - 0 - 2	5	8	-3	3
13	AC Horsens	3	0 - 2 - 1	6	7	-1	2
14	Skjold	3	0 - 1 - 2	3	6	-3	1
15	B 1909	2	0 - 0 - 2	3	7	-4	0
16	HIK	3	0 - 0 - 3	3	9	-6	0

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Atli Gregersen (Randers Freja)

B36 á øðrum plássi

Við triðja sigrinum upp í slag, er B36 nú á øðrum plássi, meðan fuglfirðingar nærkast botninum í botninum í 2. deild

Við m.a trimum málum frá Tórálvi Poulsen vunnu B36 5-1 á ÍF um vikuskiftið, og liggur havnarfelagið nú á øðrum plássi
Mynd: Álvur Haraldsen

2. DEILD MENN
Bjartur Nolsøe

Við sannførandi 5-1 sigri í Gundadali leygardagin, er annað lið hjá B36 nú at finna á øðrum plássi í 2. deild. Hóast heimaliðið vann heili 5-1 á einum tamum ÍF-liði, so var dysturin javnari, enn stóri málmunurin boðar frá.

Framherjarnir hjá B36 vóru effektivir henda dagin, og nýttu ikki nógvar málmøguleikar at gera tey fimm málini. ÍF hevði bóltin nakað, men tað kom tó ikki stórvegis burturúr.

Uppiborin hálvleiksleiðsla

Í fyrra hálvleiki hevði heimaliðið lítla leikliga yvirvág og flestu royndirnar á mál. Tað var eisini B36, sum legði seg á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Eftir uppspæl í vinstru, endar bólturin hjá Tórálvi Poulsen, sum frá 20 metra fjarstøðu kundi leggja heimaliðið frammum.

Løtu seinni var Tórálvur aftur uppá spæl. Eftir eina langa sending, rann hann ÍF-verjuna av, og fekk bóltin framvið ÍF-málverjanum, og so stóð 2-0 til B36.

Báðir partar kundu fingið okkurt máli afturat í fyrra hálvleiki, men so var ikki, og hálvleikstøðan var 2-0 til heimaliðið. Hálvleiksleiðslan var eisini uppiborin, tí havnarmenn vóru ágrýtnari, og vandamiklari frammanfyri málinum í fyrra hálvleiki.

Tvey skjót mál

Tað vóru ikki farnir meir enn 10 minuttir av seinna hálvleiki, so høvdu havnarmenn vunnið sær eina trygga 4-0-leiðslu.

Dysturin var tá avgjørdur, og tað sum eftir var av hálvleikinum skuldi heimaliðið bara halda tørn. Málið til 3-0 skeyt Eyðun Højgaard, eftir at hann varð leysur við ÍF-málverjanum. Fjóðra málið kom eftir hornaspark, og var tað enn einaferð Tórálvur Poulsen, sum hevði seinasta fót á.

Tvey mál komu afturat í seinna hálvleiki. ÍF-framherjin Rúni Petersen minkaði um munin miðskeiðis í seinna hálvleiki við langskotið, sum B36-málverjin var óheppin at missa í málið. Eftir at ÍF hevði minkað um munin, høvdu teir fleiri royndir á mál, og høvdu teir verið hepnari, so høvdu fingið okkurt mál afturat

Stutt fyri leiklok, skeyt Eyðun Højgaard sítt næsta mál í dystinum, og setti punktum fyri einum knúsandi 5-1 sigri til B36.

Fuglfirðingar nærkast botninum

Við ósigrinum um vikuskiftið, eru fuglfirðingar bert trý stig frá botninum. ÍF, sum undan kappingarárinum, var mett at vera eitt av evnunum til uppflyting, hevur ikki staði seg væl í ár.

Fuglfirðingar hava tapt seks dystir í, og hóast tað bert eru fýra stig upp til B71, sum í løtuni liggur best fyri í kappingini um at enda á øðrum plássi, so skal ÍF rættiliga taka sær um reiggj, um vend skal koma í.

Sumbingar koma á vitjan í Fuglafirði komandi vikuskiftið, og vinna fuglfirðingar ikki tann dystin, so kunnu teir vinka uppflytingini farvæl.

B36 hevur nú vunnið tríggjar dystir upp í slag, og liggur liðið nú á einum øðrum plássi. Komandi vikuskiftið skulu havnarmenn til Klaksvíkar, og vinnur B36 dystin, so er vónin um eitt heiðursmerkið brádliga ikki so fjarð.

Dysturin í tølum

B36-ÍF 5-1 (2-0)
1-0 Tórálvur Poulsen
2-0 Tórálvur Poulsen
3-0 Eyðun Højgaard
4-0 Tórálvur Poulsen
4-1 Rúni Petersen
5-1 Eyðun Højgaard

matas
Húðin hevur brúk fyri meira vætu & fiti, tá hon eldist. Elisabeth Arden anti-aging dag-, nátt & kropskrem kyklar um húðina, og fær hana aftur at kennast unga og fasta.
SMS • TEL. 31 48 88
HEILSA

STÓRT ÚRVAL AV
sjónbondum og fløgum
við andaligum tónleiki
við m.a. Bill & Gloria Gaither
ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

BRILLUGLØS við glíðandi yvirgangi gera, at tú sært klárt bæði nær og langt.
Og tað er bert brúkarin, ið veit, at talan er um fleirstyrkis gløs
SKILLING
SMS • Tel 31 56 56

Tupé'ir
til hennara og hansara, fært tú tá tær tørvar tað. Kendi merki, so sum Waldorf / Ragn og Bergmann. Alt árið, í Fríðkuni.
ÁÐRENN
AFTANÁ
Pensionista tilboð
Vit geva 20% í avsláttri av allari hárviðgerð til pensionistar, ið koma til okkum áðrenn kl. 11.30 gerandisdagar. Tó ikki leygardag.
FRÍDKAN
SMS • Tel 31 27 01
SMS | www.sms.fo